Ítróttur
e-mail: jakup@sosialurin.fo
Sosialurin - Box 76 - 110 Tórshavn - Tlf. 31 18 20 - Fax 31 47 20

Støðan, 1. deild kvinnur

	dystir	v - j - t	vunnin mál	tapt mál	málmunur	stig
1 Stjørnan	9	8 - 0 - 1	545	426	119	25
2 Neistin	8	6 - 0 - 2	384	378	6	17
3 VÍF	8	4 - 1 - 3	441	410	31	16
4 Kyndil	8	3 - 1 - 4	419	380	39	14
5 VB	8	2 - 0 - 6	458	467	-9	8
6 Tjaldur	7	0 - 0 - 7	300	486	-186	0

Stjørnan gjørdi bart í Vestmanna

Hondbóltur, kvinnur: Fyri lítlari viku síðani var VÍF einasta liðið, sum í teoriini kundi taka FM-heitið frá Stjørnuni. Hóast hesin spurningur var avgreiddur um vikuskiftið, so lat Stjørnan ongan iva vera eftir, tá tær týskvøldið vitjaðu í Vestmanna

Einki er at taka seg aftur í, at Ioana Rápa er týdningarmesti leikarin hjá VÍF. Týskvøldið kendi hon seg helst noydda at spæla, hóast hon var týduliga darvað av skaðanum, sum hon fekk móti Kyndli

Mynd: Álvur Haraldsen

JÁKUP MØRK

VÍF-Stjørnan 22-33 (14-17)

Tá Stjørnan um vikuskiftið gjørdist fyrstu føroyameistararnir í hesi øldini, var tað ikki egnum dygdum fyri at takka, men heldur tí VÍF í seinastu sekundunum snávaði móti Kyndli, sum megnaði at stjala annað stigið heim aftur við sær.

Avrikið hjá Stjørnuni var als ikki sannførandi fyri annars suverenu klaksvíksgenturnar, og ein kundi kanska hildið, at tær nú vóru farnar at taka sær av løttum, tí tær longu høvdu tryggjað sær heitið.

Tá VÍF samstundis hevði silvurmerkini at spæla fyri, kundi ein kanska ímynda sær, at hetta kundi gerast ein dystur, har vestmannagenturnar fóru at geva Stjørnuni dygga mótstøðu, men hetta kom ongantíð upp á tal.

Stórur munur á

Stjørnan legði nevnliga fyri sum eitt óløgið, og við skjótum spæli, har serliga Joan gjørdi um seg, var tað skjótt at tær byrjaðu at draga frá heimaliðinum. Tá so VÍF als ikki fekk sítt spæl at koyra, og Hallfríð ikki hevði ein serliga góðan dag í málinum, var lítið at gera hjá vestmenningum.

VÍF var annars nakað skert undan dystinum. Marjun Poulsen, sum vanliga hevur vart málið hjá teimum, noyddist av vøllinum móti Kyndli, og skaðin var somikið álvarsamur, at hon helst ikki verður at síggja á vøllinum aftur hetta kappingarárið.

Eisini leikandi venjarin, Ioana Rápa, fekk skaða móti Kyndli, men hóast hon var riggað til, so hon kundi vera á liðnum týskvøldið, so var sjónligt, at hon var darvað av skaðanum.

Miðskeiðis í hálvleiknum mentist VÍF tó nakað, tá Jacklin kom á vøllin í stað fyri Ioanu, og tað eydnaðist teimum eisini at minka nakað um munin, soleiðis at bert trý mál skildu liðini í steðginum.

Hetta at munurin nú minkaði, komst helst eisini av, at klaksvíksgenturnar nú tóku sær meira av løttum. Í øllum førum var sjónligt, at tær allar sum ein hugnaðu sær óført á vøllinum, og hóast skeivar sendingar og annað, hoyrdist ikki so mikið sum eitt ilt orð millum leikararnar.

Ikki og lítið

Fleiri áskoðarar tosaðu eisini í hálvleikssteðginum um, at tað kanska ikki fór at vera ógjørligt at vinna hesi trý málini aftur, men tað var so langt ífrá, at VÍF kvinnurnar vóru í nær námind hesum.

Stjørnan ikki bara helst fast um leiðsluna, men økti eisini um hana, og tá tær so miðskeiðis í hálvleikinum fingu sjey mál á rað, var líka sum leyst og liðugt.

Restina av dystinum meira ella minni hugnaðu sær, og leikarar fingu loyvi at royna seg á ymsum plássum, og á tann hátt slíta eitt sindur av gulllakkinum av skónum.

Endaligi munurin gjørdist heili ellivu mál, og tá tikið verður saman um, so var hetta ikki eitt mál ov lítið. Stjørnan var snøgt sagt nógv betra liðið hendan dagin, frá málmanni og út á uttasta vong.

Veldst um Ioanu

Stjørnan hevur sum kunnugt longu tryggjað sær meistaraheitið, og seinasti dysturin móti Tjaldrinum má nú metast at gerast ein rættuligur show-dystur, har leikararnir rættuliga sleppa at vísa síni kynstur.

Hjá VÍF er eitt sindur øðrvísi statt. Tær hava framhaldandi silvurmerkini at berjast fyri, men hetta krevur sigrar í teimum báðum seinastu dystunum, úti móti VB og heima móti Neistanum.

Talan er uttan iva um tveir dystir, sum á pappírinum eru torførir, og sum ikki gerast nakað lættari av teirri sannroynd, at tær mugu vera Marjuna fyri uttan, eins og tað heldur ikki kann takast fyri givið, at Ioana enn eina ferð bítur pínuna í seg og fer á vøllin.

Tað ger hon nú nokk kortini. Hesin stóri rumenin, sum allarhelst er besti kvinnuligi leikarin í landinum, hóast hon meginpartin av árinum hevur noktað at fylgt ráðunum frá læknanum, og er farin á vøllin hóast stóra pínu í rygginum og nú eisini fótinum.

Verður hon við, er væl hugsandi, at VÍF megnar at fáa neyðugu stigini burtur úr hesum báðum dystunum, men uttan leikandi venjarin er ilt at ímynda sær VÍF sum eitt seriøst boð upp á silvurmerkini.

Dysturin í tølum
Málskjúttar:
VÍF: Iona Rapa 5, Nicolina Eyðbjørnsdóttir 5, Fríða Marjunardóttir 4 (2), Jacklin Durguus 3, Signhild Petersen 3, Óluvá Poulsen 1, Randi Kúrberg 1
Stjørnan: Annika Ljósstein 9 (1), Anna K. Samson 5, Joan M. Joensen 4, Simona Hansen 4, Andrijana Milodanovic 3, Vesna Tomajek 3, Sólvá Eystberg 2, Jastrid Gullaksen 2, Ragna Andreasen 1
Brotskøst:
VÍF 2, Stjørnan 1
Útvísingar:
VÍF 2, Stjørnan 2
Domarar úr Kyndli:
Hanus Kúrberg og Hans Thomassen

Stjørnan hevði alla tíðina takið á VÍF, og staðfestu aftur, at tær eru besta kvinnuliðið í landinum

Mynd: Álvur Haraldsen

B36 meira norðurlendskt

Í royndunum at styrkja meira um hópin, fær B36 seinni í hesi vikuni vitjan av tveimum norðbúgvum, sum eftir ætlan skulu leika við besta liði felagsins komandi kappingarár

JÁKUP MØRK

Eitt av teimum feløgum, sum í mun til undanfarna kappingarár hevur mist fleiri lyklaleikarar, er B36.

Samanborið við hópin undanfarna ár, eru Arnbjørn Danielsen, Pól Thorsteinsson, Djóni N. Joensen, Øssur Hansen, Ninoslav Milenkovic og Tomislav Sivic millum teirra, sum ikki verða at síggja í hvíta búnanum komandi ár.

Sjálvandi er hetta ein frágongd, sum merkist, men hóast hetta, so hevur tilgongdin av nýggjum leikarum ikki verið so øgiliga stór higartil. Frá leiðsluni hava boðini eisini alla tíðina verið tey somu, nevnliga at felagið hevur ein breiðan hóp, og at grundarlagið fyri fyrstudeildarhópinum eigur at verða funnið innan egnar karmar.

Íslend, svenskt og norskt

Fyrst í hesum árinum frættist tó, at nýggi svenski venjari felagsins, Pelle Andersson, væntandi fór at hava ein landsmann við sær, tá hann kom til felagið, og nakað seinka kom hesin eisini til landið fyri einum tveimum vikum síðani.

Umframt Håkon Lundholm, sum navnið á svianum er, skrivaðu vit tá eisini, at B36 hevði samband við ein norskan verjuleikara, men at hetta helst fór at verða tengt at, hvussu lagnan hjá útlænta liðskiparanum, Jens Kristiani Hansen, fór at verða í Skotlandi.

Nú tykist so at siga greitt, at liðskiparin kemur aftur til landið, men kortini hava teir í B36 ikki slept ætlanunum um at styrkja hópin við útlendskum leikarum.

Norski leikarin, Tummas Sørlig, sum umframt at spæla í verjuni eisini hevur roynt seg á miðvøllinum, kemur eftir ætlan til landið hósdagin, og harumframt kemur eisini ein íslendskur leikari, Ragnar Høgsund, hendavegin.

Tummas Sørlig er 23 ára gamal, og hevur hann áður leikt í næstbestu norsku deildini, har hann hevur røkt uppgávuni sum verjuleikari og verjukendur miðvallari.

Ragnar Høgsund er 25 ára gamal, og hevur fyri tað mesta leikt í álopinum, har hann millum annað hevur verið íslendskur meistari við ÍBV, felagnum sum Allan Mørkøre nú spælir fyri. Sum skilst er talan um ein vælvaksnan leikara, sum eisini hevur roynt seg á fleiri U-landsliðum hjá Íslandi.

Kristian á Neystabø sigur við Sosialin, at teir við hesum báðum leikarum helst hava fingið seinastu prikkarnar til fyrstudeildarhópin, uttan at hann tó vil leggja seg fastan á, júst hvørjar uppgávur hesir leikarar koma at røkja.

Meira líkt føroyingum

- Í fótbólti í dag kann ein góður leikari røkja fleiri ymsar uppgávur á liðnum, so talan er sum so ikki um hvørki álops- ella verjuleikara, greiðir B36-formaðurin frá. Her á blaðnum loyva vit okkum tó at gita, at norðmaðurin í øllum førum fer at verða nýttur í verjuni, har B36 tykist illa sperr eftir frágongdina í vetur. Í álopspartinum stendur nakað betri til, við tað at vandamesta álopsparið seinastu árini framvegis er heilskapað, men í øllum førum boðar hetta frá harðari kapping um framrættaðu plássini, har ný tilkomni sviin eisini er við í kappingini.

Kristian leggur annars dent á, at teir í ár hava roynt seg við norðulendskum styrki, tí tað allarhelst er lættari at fáa hesar leikarar at fella inn í hópin, tá hesir liggja nærri føroyingum enn eitt nú eysturlendingar, bæði málsliga og mentunarliga. Helst veit hann, hvat hann tosar um, B36-formaðurin, sum áður, og við skiftandi hepni, hevur roynt seg við russum, jugoslavum, ungarum og polakkum.

Chelsea er nú víðari

Fótbóltur, UEFA Champions League: Enska liðið gjørdist tað triðja, sum tryggjaði sær sess í fjórðingsfinalunum, nú bert eitt leikumfar restar í bólki C og D

Jákup Mørk

Týskvøldið vórðu næst seinastu dystirnir í bólki C og D í øðrum bólkaspælinum leiktir í eurpeisku kappingini fyri meistarar. Til samans var talan um fýra dystir, og meðan nøkur úrslit gjørdu myndina greiðari, viðførdu onnur, at spenningurin um seinastu fjórðingsfinalusessirnar gjørdist enn størri.

Bólkur C
Bayern fremst

Bayern München, sum í undanfarnu viku tryggjaði sær frmhaldandi luttøku í fjórðingsfinalunum, tryggjaði sær eisini fyrstaplássið í bólkinum, tá teir týskvøldið vunnu 2-1 á norska Rosenborg.

Í mun til eitt nú báðar sigrarnar móti Real Madrid, kom spælið hjá týsku meistarunum tó ongantíð upp á somu hæddir, men kortini var hetta nóg mikið til at basa botnproppinum í bólki C.

Rosenborg hevði tó eisini sínar møuleikar at skora, men tá John Carew eftir góðan tíma endiliga megnaði at leggja bóltin í netið, høvdu týskararnir longu fingið tvey mál, sum Mehmet Scholl og Poulo Sergio høvdu skotið við ávíkavist frí- og brotssparki.

Hin dysturin í bólki C hetta kvøldið stóð millum Real Madrid og Dynamo Kiev, og her gjørdist endaliga úrslitið 2-2.

Heimaliðið legði seg á odda tíðliga í fyrra hálvleiki, tá Raul sendi eitt brotsspark í netið, eftir at Morientes varð feldur í ukrainska brotsteiginum. Stutta løtu seinni, fekk Dynamo Kiev møguleikan frá ellivu metrum, eftir at Demetradze varð feldur í spanska brotsteiginum, men vanliga tryggi Rebrov misnýtti gylta møguleikan, tá Casillas bjargaði skotinum.

Tíggju minuttir seinni gjørdi ukrainski starvsfelagin, Shovkosky, honum kynstrið eftir, tá Raul enn eina ferð fekk møguleikan frá ellivu metrum, og sostatt góvu trý brotsspørk innan 12 minuttir bert ta eina málið.

Beint fyri hálvleik javnaði Dynamo Kiev, tá Khatskevich skallaði eitt innlegg frá Rebrov í netið og í seinna hálvleiki tóku teir leiðsluna, tá Hierro avrættaði eitt skot frá Demetradze.

Bjargingin hjá spanska liðnum gjørdist eitt fríspark, sum Roberto Carlos bankaði í netið smáar 20 minuttir fyri leiklok.

Javnleikurin ber við sær, at liðini bæði framhaldandi eru púra jøvn á stigatalvuni, men tá innahýsis uppgerðirnar telja við javnstøðu í stigum, er Real Madrid á øðrum plássi.

Avgerðin um, hvør skal fylgja Bayern München til fjórðingsfinalurnar, má sostatt bíða til seinasta umfar. Tá hava bæði liðini útivøll. Dynamo Kiev skal til München og Real Madrid skal til Trondheim.

Bólkur D
Chelsea víðari

Enska Chelsea gjørdist triðja liðið, sum tryggjaði sær luttøku í fjórðingsfinalunum, tá teir á útivølli vunnu 3-1 á hollendska Feyenoord.

Longu í áttanda minutti hevði Chelsea møguleikan at leggja seg á odda, men Lebeouf misnýtti brotssparkið, sum Tore Andre Flo hevði vunnið enska liðnum. Chelsea kom tó á odda seint í fyrra hálvleiki, tá italiumaðurin Zola smoygdi sær inn um verjuna og legði bóltin í netið.

Hollendsku meistararnir javnaðu til 1-1, tá 15 minuttir vóru leiktir av seinna hálvleiki, men teir vóru nóg illa lidnir at takka Kalou fyri málið, tá Dennis Wise aftur hevði lagt Chelsea fram um. Fimm minuttir seinni var leyst og liðugt, eftir at norski Tore Andre Flo hevði langað bóltin upp í trýkantin.

Chelsea er nú trý stig framman fyri Feyenoord á triðjaplássinum, men við muninum í innanhýsis uppgerðunum, eru onglendingarnir vísir í at koma fram til fjórðingsfinalurnar.

Lazio vann seg upp á annað plássið í bólkinum, tá teir á heimavølli vundu burtur úr franka Marseille.

Simone Inzaghi misnýtti eitt brotsspark, tá góður tími var leiktur av dystinum, men áskoðararnir hjá heimaliðnum munnu helst hava fyrigivið honum hetta, tí frammanundan hevði hann longu skotið eitt reint hat-trick.

Tað vóru annars mong, sum rystu við høvdinum, tá svenski venjarin hjá Lazio, Sven Goran Erikson, hevði tikið Inzaghi fram um kilenska Marcelo Salas, men lítli italiumaðurin takkaði fyri álitið.

Undan steðginum hevði hann longu skotið Lazio fram um 3-0, og eftir at Leroy hevði minkað um munin stutt inni í seinna hálvleiki, og Inzaghi sjálvur hevði misnýtt brotsspark, gjørdi hann aftur málið til 4-1.

Móti endanum av dystinum skeyt Alan Boksic Lazio upp á 5-1, og tapið hevði við sær, at Marseille nú er úti úr kappingini.

Greiðir favorittar

Steypafinalurnar í flogbóltskappingini verða leiktar leygardagin

JÁKUP MØRK

Sum kunnugt verða fyri fyrstu ferð í mong aftur leiktar steypafinalur í flogbólti.

Luttakararnir til báðar steypafinalurnar vórðu funnir á tann hátt, at talan er um tey bæði liðini, sum hava staðið seg best í teimum báðum steypakappinginum, sum hava verið í Klaksvík og í Havn.

Vinnararnir vórðu teir somu í báðum kappingunum, nevnliga kvinnurnar hjá Mjølni og menninir hjá Fleyr, so hesi bæði liðini tryggjaðu sær luttøkuna á tann hátt.

Seinnu finaluluttakararnir máttu finnast við umdysti, tí tvey ymisk lið vunnu sær silvurmerkini í báðum kappingunum.

Hjá kvinnunum stóð dysturin millum Fleyr og Dráttur, og endaði hesin við, at vágagenturnar vórðu tær drúgvaru, meðan Mjølnir stóð seg betur, tá menninir har norðuri leiktu umdyst móti Fram.

Kvinnufinalan, sum sostatt verður millum Dráttur og Mjølnir, er sett at byrja klokkan 15.00, meðan mansfinalan millum Mjølnir og Fleyr er á skránni klokkan 16.30.

Atkvøðugreiðsla á www

Sum nakað nýtt hevur SvF valt at senda beinleiðis frá steypafinaludystunum.

Hetta er tó ikki tað einasta nýggja. Á heimasíðuni hjá Flogbóltssambandinum, www.fbf.fo, ber nú til at gita, hvat lið fer at vinna tær báðar steypafinalurnar. Eftir greidda atkvøðu ber eisini til at síggja, hvørji lið verða mett sum størstu favorittarnir uttanlanda.

Slíkar atkvøðugreiðslur eru vanligar á útlendskum heimasíðum, men okkum kunnugt er hetta fyrstu ferð, at hetta verður roynt í Føroyum.

Av higartil innkomnu atkvøðunum framgongur, at favorittarnir eru ávíkavist Mjølnir hjá kvinnunum og Feyr hjá monnunum. Hetta man eisini vera í tráð við vanligu fatanina millum manna, tí umframt at hava vunnið bæði í Klaksvík og Havn, hava hesi bæði liðini verið fullkomuliga einaráðandi í landskappingini.

Einasta lið, sum hevur skalað Klaksvíksgentunum í landskappingini er TB, sum eisini vann silvurmerkini, men tá tær ikki hava luttikið í kappingunum í Havn og í Klaksvík, hava tær ikki havt møguleika at tryggja sær luttøku í steypafinaluni.

Hjá monnunum hevur Fleyr enn ikki roynt at tapt hetta kappingarárið, og ikki er hugsandi, at fýrsta tapið skal koma nú leygardagin. Við leikandi rumenska venjaranum á odda, hava teir higartil skúgvað alla mótstøðu til viks. Okkurt settið hava teir kortini tapt, men tá hevur hetta einamest verið orsakað av væntandi ídni frá egnari síðu, heldur enn dygdum hjá mótstøðuliðunum, og ikki kann væntast at hugburðurin verður nakar trupulleiki, tá steypafinalurnar standa á skránni.

Í steypakappingum er tó alt gjørligt, so spennandi verður at vita, um favorittarnir megna at liva upp til heitið leygardagin, ella um talan verður um nakra sensatión í teimum báðum finaludystunum.